# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tórfinnur Hansen 70 ár



Týsdagin 20.september fyllir Tórfinnur Hansen á Skála 70 ár.

Tórfinnur er føddur í Skopun, sonur Súsonnu og Jóhan Hendrik Hansen í Skopun. Súsanna var ættað av Skarvanesi og Jóhan Hendrik úr Skopun.

Teimum var tað sjáldsama fyri, at fáa 10 synir, men onga dóttir, hesum stóra flokki er Tórfinnur yngstur av. Nú eru bert tríggir brøður eftir - Kjartan, sum býr í Sønderborg í Danmark; Oddmar, sum býr í Vestmanna, og Tórfinnur, sum býr á Skála.

Tórfinnur var sum flestu ungu føroyingar fiskimaður, eisini var hann í Íslandi og í Føringahavnini í Grønlandi og arbeiddi. Seinnu árini arbeiddi hann hjá Landsverkfrøðinginum, mest í Eysturoynni.

Síðani Tórfinnur bleiv pensioneraður, hevur hann starvast fyri kommununa á ruskplássinum á Skála, somuleiðis hevur hann tikið móti seyðaskinnum, sum hann hevur saltað, og er ágóðin farin til Meinigheitshúsið á Skála.

Í 1960 giftist hann Hildu av Skála, har tey búsettist og fingu børnini Lilliuna, Dan og Tórhild, sum nú øll búgva í Danmark.

Í 1986 andaðist Hilda aftaná strævna sjúkralegu, og var Tórfinnur einsamallur í nógv ár.Vit vóru øll sera glað um, at hann fann Janu, sum hann giftist við í 1998. Tey búgva á Skála.

Politiskt er einki ivamál, hvar hann hoyrir heima, hann er trúgvur javnaðarmaður. Í kirkjuni og Meinigheitshúsinum eru hann og Jana trúgvir stuðlar.

Eisini hevur hann fingist við ættarkanningar og veit væl at siga frá allari okkara ætt. Trúfesti til okkum øll, sum hann er ættaður við er sera stórt - takk fyri tað.

Góði farbróðir, vit ynskja tær hjartaliga tillukku á sjeyti ára degnum, og ynskja tær og Janu saman við børnum tykkara, øll góð ynski fyri framtíðina.

**Heilsan frá bróðurbørnum**

## Poulina Zachariassen 85 ár



Leygardagin 17. september 2005 fylti Poulina Zachariassen í Havn 85 ár.

Poulina er ættað av Toftum, har hon vaks upp sum tann elsta av fimm systrum. Foreldrini vóru Annu Elisabeth og Magnus F. Mikkelsen, av Toftum.

Eftir kríggið flutti familjan til Havnar, har tey høvdu klædnahandilin, Magnus F. Mikkelsen Manufaktur, ella hjá Toftamanninum, sum handilin eisini varð nevndur, í húsunum hjá Honnu og Óla Christian Skála í Dr. Jacobsensgøtu, har sum Skálabúðin er í dag.

Poulina fekk arbeiði á skrivstovuni hjá Ríkisumboðnum í Havn, har hon var í úti við 25 ár.

Foreldrini fluttu seinni inn aftur á Toftir at búgva, har pápin saman við øðrum í 1953 keypti skonnartina Kongshavn, til m.a. at rógva út við bátum í Grønlandi. Eftir at Kongshavn varð seld, fluttu foreldrini aftur til Havnar at búgva.

Poulina var gift Magnusi Zachariassen av Sandi, og tey fingu sonin John Eli, sum í dag býr saman við familju síni í Esbjerg.

Í dag býr Poulina á Ellisheiminum í Havn.

### Dagurin

**20. september. Tobias**. Til minnis um tann Tobias, sum apokrýfiska bókin Tobits bók veit at siga frá.

Navnið er hebráiskt og merkir ***Guð er góður.***

## Inga Dahl í býráðið



**Havn:** Á býráðsfundi hóskvøldið boðaði Annika Olsen úr fólkaflokkinum frá, at henni barst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar vegna barnsburð.

Í hennara stað er nú komið tann næsti á listanum hjá flokkinum, og er tað Inga Dahl (myndin).

Tíðindaskriv:

## Fólkaflokkurin nýggjan skrivara



Tingbólkurin hjá Fólkaflokkin hevur sett Regin W. Dalsgaard í starv sum nýggjan skrivara. Durita Djurholm hevur higartil røkt hetta starv.

Regin W. Dalsgaard er í dag formaður í HUXA, sum er ungmannafelagið hjá Fólkaflokkinum. Við nýggja skrivaranum verður samstarvi ímillum ungmannafelagið og tingbólkin tískil styrkt. Regin er 21 ára gamal og hóast sín unga aldur, hevur hann verið virkin innan egið vinnuvirksemi.

### Brúdleyp

Leygardagin 17. september 2005 giftust í Saron í Vestmanna Ketty Kjærbo úr Skopun og Magnus Pauli Johannesen úr Vestmanna.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 20. september hava Elin og Leivur á Torkilsheyggi, Nes, Toftir, silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd silvurbrúdleypsdagin.

### 70 ár

Týsdagin 20. september verður Judy Justinussen í Norðragøtu 70 ár. Dagurin verður hildlin í Dagtilhaldinum í Gøtubrá leygardagin 24. september frá kl. 18.00.

## Andlát og jarðarferðir

**Hallgerð Didriksen, Vestmanna**, andaðist sunnudagin 18. september, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Hallgerð, kunnu lata Eldrasambýlinum í Vestmanna eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Hemming Petersen, Klaksvík,** andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi sunnudagin 18. september, 67 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Jónu Andreasen í Klaksvík** fór úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi í gjár, mánadagin klokkan 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður í dag, týsdagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jónu kunnu lata Sambýlinum í Bøgøtu eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

**Andrea Andersen, fødd Klein, ættað frá Gjógv, búsitandi í Keypmannahavn**, andaðist 16. september á Pleygudeildini Øselsgården, 89 ára gomul. Tey, ið vilja minnast Andreu, kunnu lata Gjáar kirkju eina gávu. Konto í peningastovnunum.

Kistan við **Jónu Andreasen í Klaksvík** fór úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi í gjár, mánadagin klokkan 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður í dag, týsdagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jónu kunnu lata Sambýlinum í Bøgøtu eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa

---

Kunngjørt verður, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Hallgerð Didriksen**

Vestmanna

andaðist sunnudagin 18. september 2005, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin 21. september kl. 14.

*Vegna tey avvarðandi*

**Ása, Giðja, Fríhildur og Rói**

*Tey, ið vilja minnast Hallgerð, kunnu lata Eldrasambýlinum í Vestmanna eina gávu til , konto í peningastovunum*

---

Sagt verður frá, at kæri maður, pápi og verpápi okkara

**Páll Petersen**

úti á Boðaneshamri í Havn

andaðist andaðist á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn 14. september, 63 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin 20. september kl. 14.

*Familjunnar vegna*

**Maud, Tórun og Uri**